Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

# FÍGGJARPOLITIKKUR OG BÚSKAPARSVEIGGJ

22. FEBRUAR 2010

## SØGU- OG STØÐULÝSING AV FØROYSKUM KONJUNKTURPOLITIKKI

# YVIRLIT

SAMANDRÁTTUR OG NIÐURSTØÐUR ........................................... 3
ÁBØTUR SÍÐAN KREPPUNA FYRST Í 90-ÁRUNUM ............................ 4
ÁBENDINGAR UM VIÐGANGANDI FÍGGJARPOLITIKK ........................ 7
FÍGGJARPOLITISK SAMSKIPAN MILLUM LAND OG KOMMUNUR ......... 10
KOST-NYTTUKANNINGAR AV INNTØKUM OG ÚTREIÐSLUM ............. 12

# SAMANDRÁTTUR OG NIÐURSTØÐUR

Í hesum riti verður roynt at kortleggja styrkir og veikleikar viðvíkjandi búskaparpolitikkinum. Dentur verður lagdur á fíggjarpolitikkin fyri at meta um, í hvønn mun hetta amboðið virkar eftir ætlan, og um tað er nøktandi í mun til teir stoytir, føroyskur búskapur javnan kemur út fyri.

Fíggjarpolitikkurin verður mangan roknaður sum eina amboðið av tveimum í yvirskipaða búskaparpolitikkinum, sum hevur til endamáls at tálma búskaparsveiggj. Hitt høvuðsamboðið er peninga- og kredittpolitikkurin (fylgjandi stytt peningapolitikkur). Málsøki, sum kunnu roknast at vera partar av hesum stýringsamboði, eru bert í avmarkaðan mun undir føroyskum ræði. Tí ber illa til hjá føroyskum myndugleikum at stuðla fíggjarpolitiskum málum við peningapolitiskum átøkum. Tvørturímóti kunnu peningapolitiskar avgerðir hjá t.d. Danmark ella ES virka stimbrandi í Føroyum í tíðarskeiði, har heimligu konjunkturviðurskiftini tala fyri bæði tálmandi fíggjarpolitikki og tálmandi peningapolitikki. Sama, tá ið byltingar eru innan heimligu bankavinnuna, sum tykjast hava elvt til dyggastu stoytirnar, sum búskapur okkara hevur verið fyri í tíðarskeiðinum eftir annan veraldarbardaga.

Ilt er at síggja, at fíggjarpolitikkurin er amboð, sum kann megna at javna út avleiðingarnar av størstu stoytunum, serliga teimum, ið stava frá kredittbylgjunum úr figgjarvinnuni. Hvat nyttar t.d. fíggjarpolitisk tátting uppá 100 mkr í einum ári, har peningastovnarnir økja um útlán síni við 2.000 mkr? Hóast fíggjarpolitikkurin í slíkari støðu ikki kann neutralisera kredittstoytin, so má roynd tó gerast at nýta fíggjarpolitiska amboðið, so langt tað røkkur.

Nevndu árin uttan- og innaneftir gera, at føroyskir myndugleikar eiga at royna at leggja seg eftir í enn størri mun enn lond við sjálvstøðugum peningapolitikki at fáa fíggjarpolitikkin at virka væl.

Allir flokkar, sum hava mannað landsstýrissamgongur í nýggjari tíð, hava sagt seg viljað ført stabiliserandi fíggjarpolitikk. Men verður hugt eftir tíðarskeiðinum frá 1980 og fram til í dag, er ilt at fáa eyga á ein samanhangandi fíggjarpolitikk, sum hevur tálmað búskaparsveiggini. Tvørturímóti hevur fíggjarpolitikkurin í stóran mun verið konjunktur-viðgangandi. Hetta tykist serliga at hava gjørt seg galdandi, tá ið peningastovnarnir hava stimbrað búskapin við stórum útlánsvøkstri, og øvugt.

Munandi ábøtur eru tó framdar síðan búskaparkreppuna í 90-árunum innan regluverk, framferð og kunningar- og hagtalskipanir, sum hava við almennu búskettini at gera.

Enn er tó langt eftir á mál, áðrenn til ber at siga, at Føroyar hava ein vælvirkandi fíggjarpolitikk. Stórar avbjóðingar snúgva seg í hesum viðfangi um at loysa trupulleikar, ið standast av:

- at atlit ikki verða tikin til skiftandi peningapolitisk viðurskifti, tá ið fíggjarlóg og onnur almenn búskett verða fyrireikað
- at lítil ella eingin fíggjarpolitisk samskipan hevur verið ella er millum ymsu partarnar innan almenna geiran, serliga millum land og kommunur
- at langtíðarmál ikki verða sett viðvíkjandi fíggjarpolitikkinum, herundir løguætlanir hjá almenna geiranum sum heild og
- at kost-nyttu kanningar ikki systematiskt verða brúktar í politisku raðfestingini av ymsum útreiðslu- og inntøkusløgum hjá tí almenna

# ÁBØTUR SÍÐAN KREPPUNA FYRST Í 90-ÁRUNUM

Hákonjunktururin í 1980-árunum og kreppan fyrst í 90-árunum fekk løgting og landsstýri at ásanna, at tørvur var á at styrkja ymsar stovnar og skipanir, sum høvdu við búskaparpolitikkin at gera.

Stýrisskipanin: Ein grundleggjandi broytingin, sum varð framd, kom við nýggju evstulóg, stýrisskipanini, sum varð sett í gildi Ólavsøkudag 1995. Við ásetingini í grein 33 í evstulóg varð farið burtur frá, at limirnir í landsstýrinum í felag høvdu ábyrgd av ymsu málsøkjunum, sum vóru undir føroyskum ræði. Við nýggju skipanini fekk einstaka landsstýrisfólkið ábyrgd av teimum málsøkjum, sum løgmaður gav tí at sita fyri.

Okkurt kundi bent á, at hendan ábyrgdarskipanin ikki virkar eins væl og ætlað. Í miðlunum seinnu árini er til dømis javnan komið fram, at landsstýrisfólk antin ætla sær á landsstýrisfund ella hava verið á landsstýrisfundi fyri at leita sær undirtøku viðvíkjandi tiltøkum hesi hava í umbúna. Neyvan er heppið at nýta landsstýrisfundin sum "autoritet", tá ið landsstýrisfólk seta sær fyri at fyrireika og fremja tiltøk innan egin málsøki. Somuleiðis hevur gongdin seinnu árini í almenna kjakinum verið tann, at einstøku samgonguflokkarnir nýta alt størri orku til at leggja seg út í málsøki, sum landsstýrisfólk hjá somu flokkum *ikki* umsita. Rættari hevði í hesum høpi verið, at einstøku flokkarnir í samgongu lótu hvønn annan fáa friðin til at fremja tað, ið semja var um, tá ið landsstýrissamstarvið byrjaði við undirritan av samgonguskjalinum.

Í greinunum 41-45 í stýrisskipanarlógini verða landsins fíggjarmál skipaði, og hevur ráðharrin í fíggjarmálum sambært hesum skyldu til at leggja fram uppskot á tingi um fíggjarlóg fyri komandi ár í seinasta lagi 3 mánaðir undan ársskifti. Mannagongdir viðvíkjandi eykajáttanum verða eisini ásettar. Somuleiðis krøvini til, nær endaligur landskassaroknskapur skal verða liðugur, og at hesin skal grannskoðast av serligari tingnevnd. Grannskoðaranevndin skal fara ígjøgnum árliga landskassasroknskapin og ansa eftir, at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg. Við hesum grundreglum varð vónað, at trupulleikar, sum í 80-árunum stóðust av vánaligari útreiðslustýring, minkaðu.

Stór óheimilað nýtsla hevur tó tikið seg uppaftur seinnu árini innan fleiri málsøki, ið stríða móti §43 í evstulóg um stýrisskipan Føroya. Við nýggju játtanarlógini - lóg nr. 42 frá 4 mai 2009 - er tó vón sett fram um, at útreiðslubrotini fram yvir minka.

Avtøka av landskassagrunnum og veðhaldslógum: Eini trupulleikin í fíggjarpolitikkinum í 80-árunum snúði seg um, at løgtingið játtaði pening til grunnar á fíggjarlógini við ymsum endamálum. Útreiðslurnar hjá hesum grunnum vóru mangan ikki samanfallandi í tíð við tær, sum sóust á rakstrarpostunum á fíggjarlógini. Av tí, at talan var um stórar upphæddir hesi árini, kundi vera torført at fáa greiðu á, í hvussu stóran mun útreiðslurnar á rakstrarpostunum ávirkaðu innlendska eftirspurningin einstøku árini.

Roknskaparskipanin, ið gjaldstovan nýtti um hetta mundið, gjørdi tað ikki lættari at basa hesum ógjøgnumskygni, tí sera torført var at útvega yvirlit, sum lýstu eftirspurningsávirkanina, ið stóðst av landskassagrunnunum.

Annar trupulleiki í útreiðslustýringini og ikki minni í gjaldførisstýringini hjá landinum í 80-árunum snúði seg um stóru veðhaldsveitingina, sum landsstýrið stóð fyri, serliga í tíðarskeiðnum 1982-89, og sum lýst er í talvu 1 niðanfyri.

Her var talan um amboð, sum í ávísan mun kann sigast at vera peningapolitiskt, tí tað ávirkaði í stórum eftirspurningin hjá føroyskum fyritøkum eftir kreditti, samstundis sum veðhaldini eisini stimbraðu útboðshugin hjá bæði føroyskum og útlendskum fíggingarstovnum. Skipanin avmarkaði

tapsvágan og trýst á bæði lántakara og lángevara til at gera haldgóðar íløguætlanir. Góðskan á privatu íløgunum, sum vóru fevndar av veðhaldsskipanini, var tískil hareftir. Hetta kom til sjóndar í seinnu hálvu av 80-árunum sum stórar útreiðslur hjá landskassanum, tá ið føroyskir og útlendskir fíggingarstovnar komu til landsstýrið eftir peningi, sum føroyskar fyritøkur ikki megnaðu at rinda aftur.

Felags fyri veðhaldini og siðvenjuna hjá løgtinginum at játta pening av rakstri landskassans til grunnar var, at lítið tamarhald var á, nær játtaðu upphæddirnar fullu til gjaldingar og harvið ávirkaðu gjaldføri landskassans og búskapin sum heild.

Í uppruddingini undir og eftir kreppuna varð í stóran mun gjørt av við grunnaskipanina og veðhaldslógirnar.

ALS og AMEG: Eitt hitt størsta frambrotið fíggjarpolitikkinum viðvíkjandi, sum kreppan fyrst í 90-árunum skundaði undir, var arbeiðsloysisskipanin ALS. Skipanin kann lýsast sum ein sokallaður sjálvvirkandi fíggjarpolitiskur útjavnari, har uppsparing verður bygd upp í góðum tíðum og øvugt í tíðum við stórum arbeiðsloysi og minkandi framleiðslu. Fortreyt fyri, at slík skipan kann virka útjavnandi er sjálvandi, at inngjaldið til skipanina hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum ikki lækkar í hákonjunkturi og øvugt.

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin AMEG virkar eins og ALS eisini sum sjálvvirkandi útjavnari við tað, at inngjøldini økjast, tá ið búskaparliga virksemið er stórt og øvugt, meðan útgjøldini eru javnt vaksandi yvir longri áramál.

Betri skipað fígging av landskassahalli: Landsbankin fór í byrjanini av 90-árunum undir sítt virksemi sum bankasamband landskassans. Serlig lóg varð gjørd í 1992, sum álegði landskassanum at hava innlán í landsbankanum, sum í minsta lagið svaraði til 15% av BTÚ. Í somu lóg fekk landsstýrið atgongd til fígging úr landsbankanum eftir ávísum mannagongdum, sum tryggjaðu fíggjarmálaráðnum og landsbankanum skotbrá til at fyrireika lántøku í sambandi við landskassahall. Farið varð burtur frá at útvega landskassanum lán beinleiðis frá fíggingarstovnum; í staðin varð farið undir at fíggja landskassahall við lánsbrævaútgávu.

Umsiting av almennari gjaldoyragoymslu: Landsbankin tók um hetta mundið yvir innlánini hjá landskassanum í peningastovnunum. Peningastovnarnir vóru í hesum árum illa fyri, og megnaðu ikki at lata landskassan taka út sín egna innlánspening, nú hann hevði hall. Ein tillagingarskipan varð gjørd, sum gav føroysku bankunum 5 ára freist til at frígera innlánini hjá landskassanum.

Ein grundleggjandi læra var og er í hesum viðfangi, at landsbankin í umsitingini av gjaldføri landskassans eigur at virka fyri, at føroysku fíggjarstovnarnir ikki gerast bundnir av almennum innlánum. Úttøka av peninginum skal ikki órógva fíggjarstovnarnar í lágkonjunkturi, tá ið hall tekur seg upp í landskassanum, og roknast kann við, at fíggjarstovnarnir sjálvir fáa fíggingartrupulleikar at dragast við. Landsbankin hevur í hesum viðfangi seinastu 15 árini í stóran mun hildið gjaldførið hjá landskassanum sum plaseringar uttanlands. Føroysku peningastovnarnir hava tó partvíst havt atgongd til hendan pening í sambandi við styttri plaseringar. Hetta í kapping við útlendskar peningastovnar um rentutreytir og har neyv bindingartíð – vanliga minni enn 3 mánaðir – hevur verið avtalað millum landsbankan og peningastovnin.

Roknskapar- og leiðslukunningarskipanin: Við lóg um landsins almenna roknskaparhald frá 1994 og tilhoyrandi kunngerð um landsins roknskaparverk frá 2007 vóru reglur fingnar til vega, sum styrktu skilhaldið viðvíkjandi landskassanum. Áður var so, at analytiska virðið á tølum, sum høvdu við játtan og roknskap landskassans at gera, var vánaligt hjá teimum, sum royndu at gera sær eina mynd av fíggjarpolitiska virknaðinum, sum stóðst av inntøkum og útreiðslum landskassans.

Gjaldstovan stóð í 90-árunum fyri stórum parti av arbeiðinum at betra um roknskaparkervið hjá landinum. Týðandi partur í hesi tilgongd var at gera ein fleirtáttaðan kontostrong, sum bæði kundi brúkast í fíggjarstýringini á stovnsstøði og á makrostøði. Sokallaði standardkontoplanurin, sum er nær skyldur við kontobygnaðin í tjóðarroknskaparvegleiðingini hjá ST (SNA93) og ta hjá ES (ENS95) saman við nýggjari talgildari skipan, sum varð tikin í nýtslu í 1997, var eitt stórt stig framá.

Arbeitt hevur verið í mong ár við at gera líknandi skipan fyri kommunala geiran. Slík skipan er tikin í nýtslu av kommununum, galdandi frá og við fíggjarárinum 2010[1]. Á gjaldstovuni er skipan ment, sum kann lýsa konsolideraði búskett hjá landi og kommunum fyri 2010 og fylgjandi ár, samstundis sum til ber at fylgja við í útreiðslum og inntøkum umframt ogn og skuld hjá hesum mánaðarliga, so hvørt fíggjarárið líður.

Við hesum er hagfrøðiligt grundarlag fingið til vega fyri fíggjarpolitiskari samskipan millum land og kommunu í komandi tíðum.

Rating: Í 2008 var á fyrsta sinni rating gjørd viðvíkjandi føroyska búskapinum. Altjóða ratingstovnurin Moody’s stóð fyri hesum. Við ratingtilgongdini verður búskaparpolitikkurin í Føroyum við jøvnum millumbilum eftirkannaður av serfrøðingum uttaneftir. Av stórum týdningi fyri ratingina eru tiltøkini, sum løgtingið og landsstýrið fremja fyri at tryggja vøkstur og at rætta ójavnvágir, sum taka seg upp í búskapinum. Vantandi ella óheppin tiltøk hava við sær lægri rating og minni álit á føroyskan búskap millum íleggjarar. Hetta kann síðan vísa seg sum hægri rentukostnaður í samband við lántøku hjá ikki bert landskassanum, men eisini kommunum, fyritøkum og húsarhaldum.

Við ratingtilgongdini fáa myndugleikar landsins frá útlendskum serfrøðingastovni ábendingar um, í hvønn mun førdi fíggjarpolitikkurin er álitisvekjandi ella ikki.

Nýggja játtanarskipanin: At enda kann nevnast, at nýggja játtanarskipanin - lóg nr. 42 frá 4. mai 2009 - møguliga kann hava við sær betraða fíggjarpolitiska dissiplin. Her verður serliga hugsað um grein 8 í lógini. Sambært hesi skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum innan 1. apríl leggja fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina komandi ár, býtt á greinar. Somuleiðis er í somu grein krav um, at greining skal leggjast fram, sum lýsir gongd innan almenna geiran og búskapin sum heild.

Somuleiðis er grein 11, stk. 2 at meta sum fíggjarpolitiskt frambrot. Ásetingin í hesum brotið er fylgjandi:

> “Inntøkur og útreiðslur verða vístar í fleirárs yvirlitum, sum fevna um síðstu roknskapirnar, fíggjarlógina, fíggjarlógaruppskotið og veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár.“

---

[1] Nakrar minni kommunur við íbúgvatali undir 400 eru tó ikki við í skipanini í 2010, men verða væntandi við komandi fíggjarár.

# ÁBENDINGAR UM VIÐGANGANDI FÍGGJARPOLITIKK

Talva 1 niðanfyri er dømi um tíðarskeið við uppgangandi konjunkturstoyti frá fíggjarvinnuni saman við støddum, sum lýsa konjunkturpolitiska leiklutin hjá stats- og landsmyndugleikunum.

Í talvuni sæst, at føroysku peningastovnarnir fyrst í 80-árunum fóru undir ógvusligan kredittvøkstur. Við árslok 1989 vóru útlánini nærum 5-faldaði í mun til útlánini við árslok 1980. Serliga stórur var útlánsvøksturin í 1986 og 1987. Í prosentum vuksu útlánini hesi árini við ávikavist 25% og 31%. Í mun til bruttotjóðarúrtøkuna var somuleiðis talan um miklar støddir: ávikavist 21% og 30%.

Í 1986 eydnaðist landsstýrinum og løgtinginum at seta tálmandi tiltøk í verk á inntøkusíðuni hjá landskassanum við m.a. oljuavgjøldum. Einar 300 mkr í keypiorku blivu á heysti 1986 og fram til árslok 1987 í hesum viðfangi drignar inn úr búskapinum. Samstundis var útreiðsluvøksturin hjá statinum og landinum undir einum hóvligur[2]: 7% í 1985, 1% árið eftir og 7% í 1987. Árini frammanundan hevði stórur útreiðsluvøkstur gjørt seg galdandi, skiftandi millum 11% og 20%.

Í mun til kredittvøksturin í 1986 og 1987 - her bert partvíst lýstur við útlánunum hjá føroysku peningastovnunum - vóru fíggjarpolitisku inntrivini hjá landsstýrinum veik. Ikki hepnaðist við tiltøkunum at fáa bilbugt við grundleggjandi ójavnarnar, sum longu í 1981 gjørdu seg galdandi í ólukkumát: ov mikið virksemi til ov fáar hendur umframt stór og áhaldandi gjaldsjavnahøll við fylgjandi skuldarbinding, hóast árligi stuðulin úr statskassanum svarandi til uml. 15% av BTÚ pyntaði inntøkusíðuna á gjaldsjavnanum.

Tálmandi fíggjarpolitikkurin í 1986 og 1987 varð tó gjørdur til einkis av landsstýrinum sjálvum, sum hesi árini veitti nýggj veðhald – her var talan um máttmikið og vágiligt peningapolitiskt amboð - uppá ávikavist 566 og 239 mkr[3].

Samanlagt vórðu tiltøkini hjá landsstýrinum í 1986 og 87 tí ikki kontraktiv; saman við kredittvøkstrinum hjá fíggjarvinnuni gjørdist samlaða úrslitið stórt undirskot á gjaldsjavnanum og framhaldandi avskeplaður innlendskur arbeiðsmarknaður.

I 1988 var, eins og í 1984, valár. Útreiðsluvøksturin í 1984 var stórur, umleið 360 mkr, svarandi til 20% í mun til árið fyri. Her kann ikki sigast, at talan var um tálmandi útreiðsluvøkstur har búskapurin var “yvir-upphitaður”, sum frøðingar um hetta mundi tóku til. Enn minni í 1988, tá útreiðslurnar øktust við 988 mkr í mun til árið fyri, svarandi til 40%. Fittur partur av hesi útreiðsluøking (235 mkr) stavaði frá gomlum politiskum veðhaldsavgerðum, sum nú noyddu hesa útreiðslu á landskassan. Draga vit hesa bundnu útreiðslu frá samlaða útreiðsluvøkstrinum er framvegis einki, ið vísir, at landsstýrið hetta árið royndi at niðurkøla upphitaða búskapin.

Neyvan er neyðugt at viðmerkja, at arbeiðsloysið í 1988 ikki var stórur trupulleiki millum føroyskar arbeiðstakarar. Og neyvan er nakar bilsin um, at gjaldsjavnahallið hetta árið ikki hvarv, heldur enn vaks til meiri enn 20% í mun til bruttotjóðarúrtøkuna.

Í 1989 minkaði bruttotjóðarúrtøkan í leypandi prísum við 12% í mun til árið fyri. Við fíggjarvinnu, sum hevði spent stór og váðin útlán fyri seg árini undan, við landskassa, ið somuleiðis var illa fyri,

---

[2] Útreiðslurnar hjá statskassanum og landskassanum verða her viðgjørdar undir einum, fyri at minka um trupulleikar av dátubrotinum, sum stendst av, at útreiðslurnar hjá statskassanum blivu broyttar frá endurgjaldsskipan til heildarveiting frá og við fíggjarárinum 1988.

[3] Kann vera, at veðhaldsveitingin hevur verið størri enn lýst í talvu 1, tí landsstýrið ikki í øllum førum lat gjaldstovuni veðhaldsskjølini til skrásetingar so hvørt tey vórðu undirritaði av løgmanni ella øðrum í hansara stað.

og við stórari uttanlandsskuld fyri landið alt var ikki stórt fíggjarpolitiskt rásarúm til at ganga móti framleiðslufallinum og arbeiðsloysinum, sum nú fór at gera um seg.

KREDITTVØKSTUR OG FÍGGJARPOLITIKKUR 1980-1989 — TALVA 1

| *mkr* | Vøkstur í innanlands útlánum hjá føroysku peningastovnunum | Vøkstur í rakstrar- og løguútreiðslum lands- og statskassans | Nýggj landskassa-veðhald | BTÚ |
|---|---|---|---|---|
| 1981 | 263 | 169 | 52 | 2.946 |
| 1982 | 509 | 159 | 444 | 3.452 |
| 1983 | 466 | 189 | 221 | 4.196 |
| 1984 | 728 | 358 | 197 | 4.551 |
| 1985 | 814 | 158 | 257 | 5.099 |
| 1986 | 1.200 | 31 | 566 | 5.837 |
| 1987 | 1.894 | 160 | 239 | 6.372 |
| 1988 | 998 | 988 | 354 | 6.882 |
| 1989 | 766 | 382 | 225 | 6.023 |

Kelda: Mánaðarjavnar hjá peningastovnunum; Árbøkur hjá ríkisumboðnum og landskassaroknskapir fyri tíðarskeiðið 1980-89
Viðm.: Roknskaparárið hjá landskassanum gekk fram til 1985 frá og við øðrum ársfjórðingi til og við við fyrsta ársfjórðing árið eftir.

Makrobúskaparliga søgan, sum fylgir henni, ið lýst er í talvu 1, er í stuttum, at fíggjarstovnarnir í 1991 og fylgjandi ár fóru undir kredittminking mótvegis einskilda geiranum, samstundis sum løgting/landsstýri og kommunur hækkaðu skattir og skerdu útreiðslur. Arbeiðsloysið gjørdist stórt; fólkafráflytingin við. Sum frá leið tóku ovurstór gjaldsjavnayvirskot seg upp.

Samanumtikið var leikluturin hjá myndugleikunum – verið seg staturin, landsstýrið og løgting ella kommunur – ikki konjunkturútjavnandi. Tvørturímóti var hann viðgangandi, bæði uppeftir í 80-árunum og niðureftir í fyrru hálvu av 90-árunum.

KREDITTVØKSTUR OG FÍGGJARPOLITIKKUR 2000-09 — TALVA 2

| *mkr* | Vøkstur í innanlands útlánum hjá føroysku peningastovnunum | Vøkstur í skattainntøkum landskassans | Vøkstur í rakstrar- og løguútreiðslum landskassans | BTÚ |
|---|---|---|---|---|
| 2001 | 865 | 310 | 156 | 9.586 |
| 2002 | 653 | 221 | 359 | 9.995 |
| 2003 | 440 | -39 | 101 | 9.780 |
| 2004 | 100 | -44 | 135 | 10.091 |
| 2005 | 740 | 26 | 70 | 10.398 |
| 2006 | 2.414 | 435 | 260 | 11.738 |
| 2007 | 5.102 | 317 | 381 | 12.412 |
| 2008 | 353 | -39 | 389 | 12.474 |
| 2009 | -197 | -274 | -125 | 12.080 |

Keldur: ML-hagtøl frá føroysku peningastovnunum fyri 2003 og fram. Tøl aftur til 2000 eru mett av landsbankum út frá mánaðarjavnafráboðanum frá føroysku peningastovnunum til Tjóðbanka Danmarkar. Fráboðanarskipanin varð niðurløgd í 2003.

Ganga vit fram eftir í tíð, er okkurt, ið bendir á, at konjunkturpolitiska søgan omanfyri lýst, endurtekur seg í tíðarskeiðinum 2000-2009. Hetta gevur talva 2 greiðar ábendingar um. Vit síggja her t.d., at heimligi vinnuligi fíggjargeirin fer undir stóra útlánsekspansión árini fram til 2008. Hóast landið letur stórar skattalættar hesi árini, vaksa skattainntøkurnar hjá landi (og kommunum) í stórum. Í 2006-07 letur til, at verulig kreditt-flóðalda skolaði yvir búskapin, har útlánini til føroyskar eindir hjá føroysku peningastovnunum øktust við ávikavist 2,4 og 5,1 milliardum krónum, svarandi til árligan prosentvøkstur uppá 24% og 41%. Eftirfylgjandi fella hesi tøl til 2% í 2008 og minus 1% í 2009. Harðligi kredittsamandrátturin í 2008 og 2009 varð tó í ávísan mun mótvirkaður av, at donsk realkredittfeløg hesi árini av heimligu fíggjarvinnuni blivu leidd inn á føroyska bústaðarmarknaðin í roynd at frígera gjaldføri hjá peningastovnunum við umlegging av sethúsalánum til realkredittlán.

Ikki er einki í tíðarskeiðinum frá 1980 og fram, ið bendir á, at landsmyndugleikarnir aftaná lítið skotbrá lata útreiðslurnar ganga sama veg sum inntøkurnar. Sjálvandi er hetta syndarligt fyri konjunkturútjavningina, ið skuldi verið.

# FÍGGJARPOLITISK SAMSKIPAN MILLUM LAND OG KOMMUNUR

Kommunali geirin hevur seinastu 15 árini í vavi svarað til millum 11 og 13% av búskapinum, roknað sum lutfall millum kommunalu skattainntøkurnar og bruttotjóðarúrtøkuna.

Sjálvfylgja skuldi tí verið, at reikað fyri neyvari samskipan av fíggjarlóg og kommunalu fíggjarætlanunum í sambandi við fíggjarpolitiskan málsetning um at javna út búskaparsveiggj. Soleiðis hevur tó ikki verið higartil, hóast okkurt átakið hevur verið roynt.

Ein grundin til hetta er møguliga, at hagfrøðiliga grundarlagið ikki hevur verið til staðar, m.a. tí at kommunalu búskettini og roknskapirnir hava verið settir upp á ymsan hátt, samstundis sum tey hava verið lítið sambærlig við tølini viðvíkjandi landskassanum. Sum áður greitt frá, er hesin taltekniski trupulleikin loystur, nú kommunurnar í 2010 eru byrjaðar at brúka somu kontoskipan og KT-kervi sum landskassin. Hetta hevur við sær, at Gjaldstovan kann seta upp konsolideraða fíggjarætlan fyri land og kommunur. Somuleiðis ber við skipanini so hvørt fíggjarárið líður at fylgja við í, hvussu fíggjarætlanirnar verða veruleikagjørdar.

Onnur grundin til vantandi samskipan hevur verið, at kommunupolitikkarar hava hildið fast um kommunala sjálvræðið við at vísa á, at landið ikki eigur at leggja seg út í, hvussu stórar kommunalu útreiðslurnar - her undir íløgurnar – eiga at vera.

Kommustýrislimir hava ábyrgdina av fíggjarligu viðurskiftunum hjá einstøku kommununum, teir umboða. Tí koma slík sjónarmið ikki óvart á. Hinvegin hava limir í landsstýri og løgtingi ábyrgd mótvegis samlaða almenna geiranum – her undir eisini kommununum - og føroyska búskapinum sum heild. Kommunala sjálvræðið skal virðast, tó soleiðis, at kommunurnar eisini virða fíggjarpolitisk heildaráhugamál, sum landspolitikkarin hevur ábyrgdina av.

Neyðugt er at vísa á hesi viðurskifti, tí sum talva 3 vísir, er okkurt, ið bendir á, at kommunurnar undir einum hava vaksandi inntøkur í uppgangstíðum við fylgjandi útreiðsluvøkstri í árum, har konjunkturatlit tala fyri útreiðslutálming. Við øðrum orðum tykjast kommunalu búskettini at vera konjunkturviðgangandi, tó í minni mun enn galdandi er fyri landskassan. Í stutta lágkonjunkturinum árini 2002-04 tykist í hesum viðfangi eftirspurningsávirkanin frá kommunalu búskettunum at vera eftir lærubókini. Hesi árini vaksa inntøkurnar ikki tað stóra, samstundis sum kommunurnar spenna seg út við útreiðsluvøkstri svarandi til 22, 13 og 17%.

ÚTREIÐSLUR OG INNTØKUR HJÁ KOMMUNUNUM — TALVA 3

| Upphæddir í mkr | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettorakstur og løgur | 704 | 703 | 860 | 968 | 1.128 | 1.080 | 1.264 | 1.478 | 1.708 |
| Vøkstur í % | 25 | 0 | 22 | 13 | 17 | -4 | 17 | 17 | 16 |
| Skattainntøkur | 1.024 | 1.089 | 1.150 | 1.143 | 1.167 | 1.219 | 1.361 | 1.493 | 1.452 |
| Vøkstur í % | 9 | 6 | 6 | -1 | 2 | 4 | 12 | 10 | -3 |

Kelda: Dátugrunnurin á www.hagstova.fo

Ivaleyst fer kommunali geirin at gerast lutfalsliga størri komandi árini sum partur av almenna geiranum og búskapinum sum heild, so hvørt fleiri og størri málsøki verða flutt frá landsmyndugleikum til kommunurnar at fyrisita. Hetta ger, at tørvurin á fíggjarpolitiskari samskipan millum land og kommunu fer at økjast.

Í tíðarskeiðnum 1998 til 2005 varð roynd gjørd at samskipa eftirspurningin hjá landi og kommunum umvegis kommunala íløguvirksemið. Fíggjarmálaráðið setti – eftir samráðingar við

kommunurnar – samlaðan karm fyri kommunalu íløgurnar fyri komandi ár, sum síðani varð sundurlutaður millum einstøku kommunurnar.

Ivasamt er, um hendan skipanin hevði positiv árin á fíggjarpolitisku stýringina. Ábendingar vóru t.d. um, at kommunurnar royndu at sleppa sær undan at halda seg innanfyri ásettan løgukarm við at tulka løgur yvir at vera rakstur.

Í 2005 slepti landsstýrið royndini at samskipa íløgueftirspurningin hjá landi og kommunum. Hetta var dáraverk, tí heldur enn at gevast við fíggjarpolitisku samskipanini, átti størri orka at verið brúkt til at fáa slíka samskipan at virka fyri at røkka konjunkturpolitiskum málum.

Sum áður nevnt er nýggj roknskaparkunngerð við tilhoyrandi kontoskipan fyri kommunurnar nú sett í gildi. Við hesum er til taks betri talgrundarlag fyri neyvari fíggjarpolitiskari samskipan millum land og kommunur. Neyðugt er, at hesir roknskapar- og kunningartøknligu møguleikar nú verða gagnnýttir av landsmyndugleikunum. Fíggjarpolitiska samskipanin millum land og kommunu eigur fram yvir ikki bert at snúgva seg um løgu-samskipan. Allir partar av inntøkum og útreiðslum hjá landi og kommunum eiga at gerast partar av slíkari samskipan.

Grundlógar- og stýrisskipanarlig viðurskifti umframt siðvenja her á landi tala fyri, at fíggjarpolitisk samskipan millum land og kommunu verður grundað á avtalur millum land og kommunur heldur enn autoritera skipan, har landsstýrið við lóg útvegar sær heimild at áleggja kommunum fíggjarkarmar frá ári til árs. Avtalugrundaða fíggjarpolitiska samskipanin í Danmark, sum hevur virkað í nøkur áratíggju, kundi í hesum viðfangi verið virðismikil fyrimynd.

# KOST-NYTTUKANNINGAR AV INNTØKUM OG ÚTREIÐSLUM

Fíggjarpolitikkur snýr seg um roynd hjá myndugleikunum at ávirka búskaparliga virksemið umvegis útreiðslur og inntøkur hjá almenna geiranum.

Hildið verður, at tað almenna eigur og kann ávirka samlaða eftirspurningin eftir vørum og tænastum umvegis einstøku útreiðslu- og inntøkupostarnar á búskettinum hjá sær. Vanliga verður sagt, at fíggjarpolitikkur er stimbrandi, um almennu útreiðslurnar eru størri enn inntøkurnar. Fíggjarpolitikkurin er hinvegin tálmandi, um almennu útreiðslurnar eru minni enn inntøkurnar. Hendan lýsingin er vegleiðandi, men ikki nøktandi, tí samansetingin av almennum inntøkum og útreiðslum hevur eisini týdning fyri hvussu eftirspurningur og búskaparvøkstur laga seg. Ein neyvari lýsing av ávirkanini frá fíggjarpolitikkinum eigur tí at taka atlit til ymsu sløgini av inntøkum og útreiðslunum hjá tí almenna. Dømi um hetta er fylgjandi:

Løgujáttanin á fíggjarlógini hækkar eina árið við 300 mkr í mun til árið undan. Er talan um framleiðslu av bygningi í landinum vil játtanin ávirka innlendis framleiðslu, arbeiðsloysi og prísir. Er hinvegin talan um keyp av t.d. ferju úr útlondum, hevur hækkaða løgujáttanin so at siga onga ávirkan á virksemið á heimaleiðum.

Ymisk politisk mál tengja seg at ymsu inntøkunum og útreiðslunum hjá tí almenna. Talan kann vera um útbúgvingarpolitikk, býtispolitikk, vakstrarpolitikk, einskiljingarpolitikk, heilsupolitikk, eldrapolitikk, arbeiðsmarknaðarpolitikk og so framvegis. Eftirspurningsávirkanin frá inntøkum og útreiðslum á øllum hesum økjum undir einum er tað, ið vit nevna fíggjarpolitikk ella fíggjarpolitisk ávirkan.

Broytingar av inntøkum og útreiðslum innan nevndu politikk-øki verða harafturat stundum sundurgreinaði í bygnaðarlig tiltøk og tiltøk, sum ikki eru bygnaðarlig.

Við bygnaðarlig tiltøk kunnu vit skilja broytingar av karmum, sum galdandi eru fyri ymsar marknaðir, og sum grundleggjandi ávirka leikreglurnar og harvið atferðina hjá teimum, sum koma við ella koma eftir vørum og tænastum á hesum marknaðum.

Dømi um bygnaðarligt tiltak kundi verið, um tað almenna minkar um inntøkur sínar í sambandi við skatting av arbeiði og í staðin útvegar sær tilsvarandi inntøkur við at selja fiskirættindi á marknaði, har prísurin sleppur at laga seg til útboð og eftirspurning. Her kann vera, at lækkaðu inntøkurnar frá inntøkuskattinum fult út verða mótsvaraðar við øktum tilfeingisinntøkum her og nú. Búskaparligu fjarstundarárinini kunnu tó roknast at vera munandi størri inntøkur til tað almenna, tí sannlíkt er, at lækkaður arbeiðsskattur økir útboðið av arbeiðsmegi, samstundis sum marknaðarligur prísur á fiskirættindum fer at hava við sær minkaða binding av kapitali í óneyðugan veiðukapasitet. Alt hetta bygnaðarbroytingar, sum áttu at havt við sær størri búskaparvøkstur, breiðari skattagrundarlag og øktar almennar inntøkur.

Annað dømi um bygnaðarátak, sum hevur stóran týdning fyri bæði inntøkur og útreiðslur hins almenna, er lækking ella hækking av eftirlønaraldrinum við t.d. einum ári.

Ein hækking í MVG-satsinum ella inntøkuskattinum uppá 1%-stig kann neyvan vera roknað sum djúptøkið bygnaðarligt tiltak. Sama, um játtanin hjá almennum stovnum til keyp av vørum og tænastum verður lækkað við 3% í mun til undanfarið ár. Tó er uttan iva so, at eisini hesi tiltøk kunnu sigast at vera bygnaðarlig, tí tey ávirka mørkini millum ymsar marknaðir og geirar og atferðina hjá teimum, sum ferðast innan hesi mørk.

Rættast mann tí vera at rokna við, at allir teir ymsu postarnir á almennu búskettunum so ella so kunnu hava bygnaðarligan týdning fyri búskapin. Ymisk sløg av inntøkum og útreiðslum virka á ymiskan hátt á nýtslu- og framleiðsluhug.

Tá ið virkast skal fyri konsolideringsætlan fyri tað almenna er tískil neyðugt at kanna eftir hvørji árin eru á búskaparvøkstur, ið standast av ymsum inntøku- og útreiðslutiltøkum. Har tað letur seg gera, eiga inntrivini - bæði á útreiðslu- og inntøkusíðuni - at verða vigaði við kost-nyttu kanningum, og sum hava til endamáls at vísa á tey tiltøkini, sum hava frægasta búskaparvøksturin við sær.

Slíkar kanningar hava ikki verið gjørdar higartil. Týdningarmikið undantak er tó at finna innan samferðsluøkið, har Vinnumálaráðið og Landsverk hava gjørt kost-nyttugreiningar av so at siga øllum løguætlanum, sum hava verið á politiskari dagsskrá seinnu árini. Her er talan um sera virðismiklar greiningar, fíggjar- og vakstrarpolitikkinum viðvíkjandi. Tí kann tað tykjast ørkymlandi, at hesar greiningar higartil lítið og einki hava havt at siga í politisku viðgerðini. Dømini eru fleiri um, at løguætlanir, við ónyttu roknað sum samfelagsligt tap uppá hundraðtal milliónir krónur, í politisku viðgerðini sleppa at standa javnsíðis íløguætlanum, sum útrokningarnar vísa fara at geva samfelagnum nyttu, svarandi til nógvar hundrað tals milliónir krónur.

Minsta krav má vera, at limir í løgtingi og landsstýri, sum vara av búskapinum sum heild, fyrihalda seg til kost-nyttukanningarnar, sum eru til taks, og at teir í hesum viðfangi taka løguverkætlanir við positivum kost-nyttu-úrsliti framum løgur við negativum kost-nyttu-úrsliti.

Fyri at styrkja atlitini til heildarbúskapin, tá ið fíggjarætlan og serliga løguætlanir verða gjørdar, kundi skipan verið umhugsað, ið t.d. setti forboð fyri, at fólk kundu røkja starv sum løgtings- og kommunustýrislimur samstundis.

(henda síðan er tóm)

(henda síðan er tóm)

Landsbanki Føroya

GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Yviri við Strond 15 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | Tel. +298 350300 | Fax +298 350301
www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo | VTal: 382809